

Tinga KROSSUR

Nr. 32 - 81. Árg. Friggjadagur 19. september 1986 Leysasøla 5,00 kr.

Heitið fasist kann rætturin ikki taka frá tær, Óli

Dalsgaard og Müller frá javnaðinum stevndir fyri at kalla Óla Breckmann rasist

»Í politiskum stríði er ikki hvørt gildi, ein skal fara til, og ikki hvørt orð ein skal svara til-skrivar dálnevnda greinin á forsíðu Dagblaðsins seinasta mikudag. Hetta mugu vit eisini ásanna, ið av og til hava verið í hornatøkum við Óla Breckmann.

At vera skýrdur rasistur er Óla ovmikið vit, onnur hava ilt at skilja hví, eftir hatsku skrivingina í Dagblaðnum um viðurskiftini í Suðurafriku, har hvíta minnilutastýrið verður hálovað meðan myrkri hjá teim svørtu gerst alt meira kolasvart.

Hvussu kann ein verða kristin uttan at trúgva á Kristus og hvussu kann ein vera racist uttan at trúgva á eitt racistiskt styri? Tey, ið lesa Dagblaðið finna skjótt útav, at í Óla sa eygum er ein apartheid-stjórn einasta alternativið, um ein skal sleppa undan ragnarok í Suðurafriku, og tí slepst ikki undan, at lesarin hómar racist-isku «tendensirnar» hjá Ola Breckmann.

Hinvegin kann hvørki Føroyar Rættur ella ein høgri fráfalla Óla heitið fasist. Tað hevur skrivingin hjá Óla so tíðum bent á og prógvið í Sosialinum hósdagin 11. september sópar allan iva burtur.

Dagblaðið skrivaði 10. oktober 1979 grein undir heitinum Mannarættindi ella politiskt fjas» Eitt brot úr hesi greinini lýdar soleiðis: »At finna sær politiskt tilvirugrundarlag í einum langlandi og var-ugverdi, sum gólt í 1973 — **tíbetur fyri chileanska folkið** — kann ikki vera nóg mikið um nakar dugur er í hesi Chile-nevndini. Fasistiska styrið hjá Pinochet er í Óla sa eygum betur fyri fólkið enn demokratisk vald, oðrvísi kann hetta ikki lesast. Tí átti hann at givist at reypa um sínar frisinnaðu hugsjónir.

Holger Danski falsaður

Rættiligt rok hevur verið í blaðnum seinastu tíðina eftir at ein felagsskapur í Danmark, Selskap til Folkestyreta Værn hevði givið Se & Hø eina falsaða mynd, ið syndi Gert Petersen, fólkatingslim í nazistabuna. 13 ára gamal. Seinni er komið fram, at Óli Breckmann hevur tætt tilknýti til henda sera høgravenda felagsskap og serliga til blaðið hjá hónum Facet.

Nú hevur lítla, men hentа blaðið Tinga-krossur, verið í summarfrí meðan orgstan hevur verið uppa tað, ið hendir, men ikki ivast í at luttikir men betur seint enn ongantíð.

Í Politiken týsdagin stendur eitt lesarabrav undir heitinum Den Falske Holger. Hen-ning Cölding Jørgensen frá Jydstrup hevur skrivað brævið og tað lýsir eitt sindur iva somu felagsskaparins og blað Óli luttekur í.

Vit endurprenta brævið:

DEN FALSKE HOLGER

Henrik Cölding Jørgensen, Jydstrup

Tingakrossur var skjótur at verja teir báðar Jan Müller og Jóannes Dalsgaard, tá Óli Breckmann gjørdi av at stevna teir



Soleiðis ljóðar stevningin:

STEVNING

Sum advokatur fyri Óla Breckmann, blaðstjóra, Tórshavn, stevnir undirritaði

I. Tíðindablaðið Sosialurin
v/ Jan Müller, blaðstjóri
Argjavegur 26
3800 Argir og

II. Johannes Dalsgarð, landsskjalavørur
Debesartrøð
3800 Tórshavn

til at møta saksøktur í niðanfyri nevnda sakarmáli, ið hevst í Føroya rætti á tingstaði í C. Pløyensgøta 1, Tórshavn tann dag og tíma, sum rætturin setur á hesa stevning; har saksøkti verður at taka til orða munnliga/skrivliga í hesum sakarmáli og harumframt verður at leggja fram tey skjøl, hann vil styðja seg við.

SAKARKRAV

Teir saksøktu verða dømdir fyri ærumeiðing sambært revsilógina § 267, stk. 1, jfr. stk. 3.

Harumframt verður kravt at fylgjandi brot úr Tíðindablaðnum Sosialurin úr nr. 100,101 og 102 frá ávikavist 6., 7. og 11. september 1986 verða mortifiseraði samb. revsilógina § 273, stk. 1 og at teir saksøktu rinda saksøkjaranum útreiðslurnar til at kunngera dómin, jfr. § 273, stk. 2.

Fylgjandi brot verða kravd dømd deyð at vera:

»Óli Breckmann avdúkaður fyri undirgravandi virksemi«

»Óli Breckmann, blaðstjóri, tingmaður og fólkatingsmaður verður javnan skýrdur at reka undirgravandi virksemi í Føroyum. Nú avdúkar danskt blað hann fyri at vera uppi í undirgravandi virksemi í Danmark eisini,«

»Við hesi avdúkingini er tað enn einaferð staðfest, at Óli Breckmann undirgravar tað persónliga og politiska frælsi, sum erokkum tryggjað í grundlógini«,

»tí nú hevur hann bert flutt innihaldið úr blaðnum Facet, sum hann eisini sjálvur skrivar, yvir í Dagblaðið og gjørt tað útspillandi herferðina til eina herferð fyri málgagn fólkafloksins eisini.«

»(Fólkaflokkurin) Setir rasist í álitisstørv.«

»Kann bert merkja, at flokkurin í roynd og veru tekur undir við hansara rasistisku og ódemokratisku sjónarmiðum.«

»stavnamaður Fólkafloksins stuðlar einum hálvkriminellum... felagsskapi í Danmark...«,

»Hava ikki bæði stavnamaður, blað og flokkur í áravís framt gerðir, sum liggja á markinum til tað kriminella...«

»... av fullum huga fegnaðist um at demokratiski forsetin í Chile — Salvador Alliende — varð vorðin myrdur, parlamentið upployst, tingmenn í hópatali tikin av døgum, og landsins demokratisku stovnar niður-bundnir«,

»Hettar kann bert merkja at Fólkaflokkurin góðtekur hansara avslappaða forhold til skjøl, og sum heild tekur undir við hansara marghættliga grannskoðaravirksemi...«

»Heldur ikki Óli Breckmann hevur nakað til yvirs fyri politikarum, um teir ikki halda og meina tað sama sum hann. Munurin á teimum er bert tann, at Pinochet myrðir politikararnar. Óli Breckmann undirgravar teir.«

»Okkara politiskur playboyur á danatingi, Óli Breckmann, hevur krukkað bleytt — hann er rættuliga frammalaga í nøkrum sum er sera meinlíkt nynazismuni.«

Eisini verður kravt, at teir saksøktu verða dømdir at rinda endurgjald til saksøkjaran, ið verður ásett av rættinum.

SAKAREVNI:

Í byrjanini av september 1986 tekur upp seg rættuliga nógv blaðskriving í donskum og føroyskum bløðum um ein danskan felagsskap, nevndur »Selskabet til Værn for Dansk Folkestyre«, sum verður lagdur undir at hava almannakunngjørt, at formaðurin í Socialistisk Folkeparti, Gert Petersen, hevur verið limur í danska nazistaflokkinum. Felagsskapurin verður eisini lagdur undir at hava framt eina kampagnu ímóti Gert Petersen.

Saksøkjarin ið einki hevur við hesi viðurskifti at gera, verður í hesum sambandi skuldsettur av Tíðindablaðnum Sosialurin at hava staðið aftanfyri hesa kampagnu og verður annars skuldsettur fyri at fremja undirgravandi virksemi bæði í Føroyum og Danmark.

Í samband við hesa greinarøð skrivar saksøkti II grein í Sosialinum tann 11. september 1986 við yvirskriftini: »Fólkaflokkurin: Setir rasist í álitisstørv«.

Gjørt verður galdandi, at innihaldið í nevndu greinum, og soleiðis sum hesar eru uppsettar, er ærumeiðandi, og at teir saksøktu eiga at verða revsaðir samb. revsilógini § 267, stk. 1, jfr. stk. 3.

Skjal 1: Greinar úr Sosialinum, 6. sept. 1986
Skjal 2: Greinar úr Sosialinum, 9. sept. 1986
Skjal 3: Greinar úr Sosialinum, 11. sept. 1986

Tórshavn, tann 18. september 1986
Christian Andreasen, adv. ft.